## NØVN Í VIKUNI

### Olivur Joensen 55 ár

Blaðstjórin á einasta blaðnum í landinum, sum ikki verður givið út í høvuðsstaðnum, fór í gjár um tey 55.

Olivur Joensen gjørdist fyrstu ferð blaðstjóri á Norðlýsinum fyrrapartin av sjeyti árunum. Tá var Olivur eisini vikarur í skúlanum í Klaksvík, og hann og ein annar lærari, Eigil Hentze, høvdu blaðið í felag.

Í eitt tíðarskeið royndu fleiri aðrir seg sum blaðstjórar. Men síðani 1976 – og tað vil siga í eina fjórðings øld – hevur Olivur Joensen einsamallur havt ábyrgdina av Norðlýsinum. Tey fyrru árini var tað ivaleyst strígið at fáa blaðið út, men síðani nýggja tøknfrøðin av álvara gjørdi innrás í føroyska blaðheimin og serliga síðani sonur Olivur, John William, var so frægur, at hann fór at stuðla pápanum í blaðskrivingini, er Norðlýsið komið regluliga út. Tað er meiri enn sigast kann um øll onnur bløð, sum tað hevur verið roynt at geva út aðra staðni enn í Havnini.

Olivur hevur røtur í Klaksvík, har báðir abbarnir vóru kendir skiparar. Mamman, Jóhanna Sofía ella Hannufía, er dóttur Agnas og Olivur Thomsen ella Olivur í Gøtu, og pápin, John William Joensen, er sonur Armgaard og Dávur Joensen ella Dávur úr Gerðum. Olivur er elstur av fýra systkjum. Hini eru Agnas, Johan David og Ásmundur.

Olivur giftist í 1967 við Elsu Biskopstø, sum eisini er úr Klaksvík, og sum hevur verið honum ein hollur stuðul, bæði í heiminum, sum hevur verið merkt av stórum gestablídni og eisini í arbeiðnum við Norðlýsinum.

Elsa og Olivur eiga fýra børn: John William, Jastrid, Jaocbinu og Hannufíu.

Umfram at fáast við blaðskriving, hevur Olivur verið uppi í so nógvum. Hann var t. d. tann fyrsti, sum fór undir at hava kunningarstovu í Klaksvík. Tá var tað, at hann sunnudagar eitt summarið skipaði fyri ferðum kring oyggjarnar við Smyrli. Undirtøkan var sera stór, og tað hevur síðani ofta verið tikið til, hvussu væl tiltakið eydnaðist.

Í frítíðini dámar Olivuri væl at ganga, og hann er ofta á floti. Hann er trúgvur KÍ viðhaldsmaður, og tað fjala hann og hinir, sum skriva um fótbólt í Norðlýsinum ikki yvir. Tað er vørumerkið hjá blaðnum at vera lokalt, bæði í fótbólti og øðrum viðurskiftum.

Olivuri verður ynskt hjartaliga tillukku við 55 ára degnum. Tað sást ikki á honum, at hann er komin so langt, men tað er ein veruleiki!



## Týr framvegis á toppinum

Ormurin langi, sum rockbólkur Týr hevur tulkað við trummum, el-gittarum og langum hári, er best dámdi sangur hjá føroyskum bólki nakrantíð á 15 teimum bestu.

Leygarkvøldið var sangurin enn einaferð ovast á 15 teimum bestu,og sangurin fer tí undir sína 9. viku sum nummar 1 á listanum.

Listin hjá ÚF tekur pulsin millum ungfólk og tónleikaáhugað, og seinastu 9 vikurnar hava tey kosið Ormin langa hjá Tý at verða nummar 1. Eingin annar føroyskur bólkur hevur havt ein sang so leingi á toppinum í 15 teimum bestu.

Áðrenn Ormurin langi fekk valdið á 15 teimum bestu, var tað gospelrockbólkurin, I AM, sum hevði metið. Teirra sangur, Alla leið, var 7 vikur nummar 1 á 15 teimum bestu.

Nú skal I AM royna at taka oddastøðuna frá Tý, tí leygarkvøldið var teirra vakra ballada, Friðsæla stund, eykalag á 15 teimum bestu. Tríggir aðrir Prixbólkar hava roynt at fingið bilbukt við Tý á 15 teimum bestu, men tað hevur ikki eydnast higartil. Hesa vikuna er Clickhaze nummar 4, All that Rain nummar 8 og Tangz nummar 11.

## Lokal framsýning í Fuglafirði

**Í Gallari Riberhús er í hesum døgum ein lokal myndlistaframsýing við seks listafólkum úr Fuglafirði**

MYNDLIST
*John Johannessen*

Lokal málningalist og áseymaður myndir.

Hetta er evnið í einari nýggjari framsýning í Gallarí Riberhús í Fuglafirði.

Tey seks listarfólkini, ið sýna fram, eru øll úr Fuglafirði. Tey eru Heðin Kambsdal, Randi M. Gunnarsdóttir, Anni Haraldsen, Frits Johannesen og Marjun í Lambanum.

Gallarí Riberhú er opið seinnapartar gerandisdagar og leygarmorgnar.







